# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Til minnis um Petur Jacobsen

Sunnudagin 20. desember andaðist Petur Jacobsen, vanliga nevndur Petur hjá Sjeddik, í Havn, 69 ára gamal.

Petur var helst best kendur sum brandmaður hjá Tórshavnar Sløkkiliði, har hann arbeiddi í meira enn 30 ár. Hann var annars útlærdur elektrikari - lærdi hjá Leif Mohr. Hann koyrdi við egnum hýru-vogni á bilstøðini Taxa í Havn fyrst í 60-unum. Eisini arbeiddi í Thule í eitt ár og sigldi úti við skip-um hjá DFDS. Áðrenn Petur fekk starv á Brandstøðini, arbeiddi hann í sjey ár hjá elfelagnum SEV.

*-red*



*Myndin er tikin fyri fimm árum síðan, tann 15. desember 2004, tá Petur hevði 30 ára starvsdag á Brandstøðini. Her er hann saman við Kartna Jacobsen, brandmeistara, og Jan Christiansen, táverandi borgarstjóra*

## Hjørleif Waag Høgnesen farin



Sunnumorgunin 27. desember andaðist Hjørleif Waag Høgnesen á Landssjúkrahúsinum, 84 ára gamal.

Hjørleif var klaksvíkingur, føddur 13. januar í 1925. Foreldrini vóru Turid og Jóan Magnus Høgnesen, hon úr Vági í Klaksvík og hann úr Leirvík. Hjørleif var elstur av fýra brøðrum, hinir eru Róland, sáli, Símun og Hjalmar.

Tá Skonnartin Ernestine fórst undir Selvíksbjørgunum í Íslandi tann 26. mars 1930, var pápin, Jóan Magnus, ein av teimum sum fórust. Tá sat mamman eftir við fýra dreingjum, sum vóru undir fimm ára gamlir, har Hjørleif var elsur.

Á ungum árum arbeiddi Hjørleif hjá mammubeiggjanum, Einari Waag, har hann var bilførari. Seinni fór hann undir egið virksemi, og eitt langt skifti mundi hann teljast millum teirra í Klaksvík, sum høvdu flest fólk í arbeiði. Hann rak bilstøðina Auto og átti sjálvur nógvar hýruvognar, eins og buss, sum koyrdi runt vágna. Seinni hevði hann eisini bilverkstað, har bæði bilar hjá honum og øðrum vóru umvældir.

Umframt bilstøð hevði Hjørleif egnan kolonialhandil og koyrdi skúlabørn á Norðoyri, Strond og Ánunum og eitt stutt skifti eisini Norður um Fjall til Klaksvíkar í skúla. Hann var urguleikari í Christianskirkjuni í 40 ár, eins og hann eisini var urguleikari í Emmaus.

Hjørleif hevði stóran alsk til bygdina Hattarvík, og átti hann summarhús har til fyri stuttum. Hattarvík var hansara frístaður, tá farast skuldi frá dagliga arbeiðinum. Tað mundu verða fá summør at Hjørleif ikki samlaði alla sína familju í hugnaliga summarhúsinum í Hattarvík, sum eisini eru barndómsheimið hjá konuni.

Í 1954 giftist Hjørleif við Tórgerð, f. Thomassen, ættað úr Hattarvík. Tey fingu fýra børn: Turið, Eyð, Lív og Leif sum øll búgva í Klaksvík.

*-red*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hjørleif Waag Høgnesen, organistur, Klaksvík**, andaðist 3. jólamorgun á Landssjúkrahúsinum, 84 ára gamal.

**Óli á Grømma, ættaður av Viðareiði**, fer til gravar úr Hammel kirke, Vestergade 9 í Hammel, mikudagin kl. 13.

**Anna Maria Mellemgaard, fødd Olsen, fyrrverandi sjúkrasystir, ættað úr Árnafirði búsitandi í Klaksvík**, andaðist á Norðoya Røktar- og Ellisheimi sunnudagin, 91 ára gomul. Farið verður úr Kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týskvøldið kl. 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mikudagin kl. 13.

**Petrina Kristensen, fødd Hauritz, ættað av Tvøroyri**, andaðist 1. jóladag, 86 ára gomul, í Stensved í Danmark.

Sunnudagin andaðist **Salmon Johannesen, Hellur**, í Vesturstovu í Fuglafirði, 95 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Bønhúsinum á Hellum hósdagin kl. 12. Tey, ið vilja minnast Salmon, kunnu lata Vesturstovu eina gávu, konto í Føroya Banka.

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýndu samkenslu,
tá elskaða kona mín

**Marna Petersen**
Saltangará

fór heim til Harran. Gud signi tykkum øll.

*Somuleiðis ynski eg ætt, vinum og kenningum eitt av Harranum signað nýggjár.*

**Frants Petersen**

## Tøkk

Eg takki hjartaliga tykkum øllum av bygd og í bý og uttanlands, sum vóru við til at gera mín áttatiára føðingardag so hugnaligan.
Takk fyri røður og fyri sangin og takk øll tit, sum hjálptu til við at gera alt so væl til reiðar.
Eg ynski tykkum øllum eitt gott og eydnuríkt nýggjár.

**Blíðar heilsanir**
**Poula Apol**

**Dagurin**

29. desember. Nóa. Dagur til minnis um mannin, sum gjørdi ørkina (1. Mós. 6-9).

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*